# Við sviðusoð í nýggju dagpeningalógini



*- Eg rokni við, at løgtingslimirnir, ið atkvøddu fyri antin hava sovið í tímanum ella eru skeivt kunnaðir, tá ið teir broyttu dagpeningalógina, sigur Leila á Lofti, fysioterapeutur*

**- Eingin hevur nakrantíð sagt við meg, at eg kann tað sama halda uppat at gjalda til dagpeningaskipanina, tí eg havi kortini ikki rætt til nakað, sigur Leila á Lofti, sum rekur fysioterapistovu á Argjum**

DAGPENGAR
*Turið Kjølbro*

Ikki bara listafólk eru við sviðusoð, nú dagpeningalógin er broytt. Eisini smærri sjálvstøðug arbeiðspláss eru burturvíst úr Sjálvbodnu Dagpeningaskipanini. Leila á Lofti, sum rekur fysioterapistovu á Argjum, fekk seinasta summar at vita frá Almannastovuni, at hon ikki longur hevur rætt til sjúkrapengar frá Sjálvbodnu Dagpeningaskipanini, um hon verður sjúk. Fysioterapistovan er smápartafelag, og megnar ikki at gjalda løn til starvsfólk, verða tey sjúk.

- Í mínum føri er partafelagið bara eg. Arbeiði eg ikki, fái eg heldur onga løn. Eg má fáa A-inntøku sambært smápartafelagslógini og átti tí sum onnur havt rætt til løn vegna sjúku, men havi umframt tað tryggjað meg, helt eg, við eisini at gjalda til Sjálvbodnu Dagpeningaskipanina.

- Smápartafelag stovnaði eg, tí tað sambært ráðgeving skuldi gjørt viðurskiftini einfaldari, men eg haldi, at fólk eiga at fáa at vita, tá ið tey tekna smápartafeløg, hvussu tey eru fyri, um tey verða sjúk. Eingin hevur nakrantíð sagt við meg, at eg kann tað sama halda uppat at gjalda til dagpeningaskipanina, tí eg havi kortini ikki rætt til nakað, sigur Leila á Lofti.

## Ikki lagt upp fyri

Fyri tveimum árum síðani setti Leila á Lofti, sum tá aftur kom í hornatøkur við dagpeningaskipanina, seg í samband við sakføraran hjá sínum fakfelag fyri at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

- Eg bað sakføraran hjá Føroyskum fysioterapeutum, um at hjálpa til við hesum principiella máli, tí vit eru fleiri fysioterapiklinikkir, ið eru skipaðar sum smápartafeløg, men nú er tvey ár liðin, og eg havi onki frætt aftur enn.

Um eingin avtala er við arbeiðsgevaran, sigur lógin fyri starvsmenn, at lønmótakarin skal hava løn frá dagpeningaskipanini, verður hann sjúkur. Dagpeningaskipanin heintar síðani peningin aftur frá arbeiðsgevaranum.

- Hetta ber jú ikki til í mínum føri, tí í lønar- og útreiðslupartinum, vit hava samráðst okkum til við Sjúkrakassan, er als ikki lagt upp fyri slíkum. Almanna- og heilsumálastýrið skal góðkenna sáttmálan, vit arbeiða eftir, so tey vita akkurát, hvørjar umstøður vit arbeiða undir, sigur Leila á Lofti.

## Vánalig málsviðgerð

Leila á Lofti hevur goldið til Sjálvbodnu Dagpeningaskipanini síðani 1989.

- Tá ið kunningin kom frá Almannastovuni, gjørdist eg ikki klókk. Tað er sum um ein kann vænta hvat sum helst haðani. Tíbetur havi eg ikki brúk fyri dagpengum nú, men eg setti meg beinanvegin í samband við landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum við nøkrum spurningum, sum eg ikki havi fingið svar uppá enn. At venda mær til dagpeningaskipanina, kom mær ikki til hugs, tí hvørja ferð eg havi tosað við fólk har, havi eg kent meg ógvuliga illa. Følt tað sum um tey halda, at eg snýti tey, og tá er okkurt heilt galið. Málsviðgerðin er ikki soleiðis, at tú følir tey royna at hjálpa tær.

Eins og listakvinnurnar, vit høvdu samrøðu við í blaðnum í gjár greiða frá, hevur Leila á Lofti eisini hvørja ferð, hon hevur havt rætt til dagpening, verið noydd at stríðst og strevast fyri at fáa eitt oyra. Fyrstu ferð í 1993, tá ið hon og maðurin ættleiddu fyrsta barnið. Tá var eingin barsilsgrunnur, men foreldur, sum ættleiddu børn og ikki vóru almenn sett, høvdu heldur ikki rætt til dagpening í barnsburðarfarloyvinum.

- Eg havi verið noydd at leika í hvørja ferð, hóast eg altíð havi havt sjúkraváttan, sum er treytin. Í 1993 tók eg kampin upp, skrivaði til landsstýrismannin, sum hevði økið um hendi, og tað endaði við eftir tógvið stríð, at eisini ikki alment lønt foreldur, sum ættleiða, fáa dagpengar í barnsburðartíðini. At stríðast við myndugleikarnar er ikki tað, tú hevur bestan hug til, tá ið tú akkurát hevur fingið eitt barn, sigur Leila á Lofti.

## Gevst ikki

Verður Leila sjúk í longri ella styttri tíðarskeið, koma eingir pengar í kassan.

- Einasti møguleiki er at fara í bankan og útseta lán. Eg má bara vóna, at eg ikki blívi sjúk.

Hon ætlar sær kortini ikki at gevast á hendur nú hon eftir 13 ár er tveitt úr Dagpeningaskipanini.

- Eg havi ongantíð verið ein, sum gevi skarvin yvir á hálvari leið, so sjálvandi stríðist eg víðari. Tá ið tú ert sjúkur og illa fyri orkar tú ikki at stríðast. Eg rokni við, at løgtingslimirnir, ið atkvøddu fyri antin hava sovið í tímanum ella eru skeivt kunnaðir, tá ið teir broyttu dagpeningalógina.

# Skrivligt týskt

**Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út heftið “Deutsch schreiben” eftir André Niclasen, lærara í Føroya Studentaskúla**

ÚTGÁVA

“Deutsch schreiben” er ætlað teimum, sum hava fingið eina grundleggjandi undirvísing í týskum. Tað kann verða brúkt í 10. flokki fólkaskúlans, í miðnámsskúlunum og sum sjálvlestur hjá teimum, ið vilja duga betur týskt mál.

Her verða tey mest umráðandi økini í týskari mállæru viðgjørd við serligum denti á sagnorðabending, at brúka føllini og at gera setningar.

Til hvørt mállærufyribrigdi eru smá stykkir á føroyskum at umseta til týskt. Glosur eru uppgivnar undir hvørjum stykki at lætta um arbeiðið. Stykkini kunnu verða brúkt til bæði skrivliga og munnliga gjøgnumgongd. Aftast í bókini eru samanhangandi tekstir at umseta, umframt listar við sterkt bendum sagnorðum og frágreiðingum til mállæruorð við dømum.

Einars Prent hevur umbrotið, prentað og heft. “Deutsch schreiben” er 74 blaðsíður og fæst í bókabúðunum fyri 96 krónur.



Annita á Fríðriksmørk:

# Vil hava at vita, hví fólk eru koyrd úr Dagpeningaskipanini

**- Tá viðgerðin var í tinginum um broytingarnar í dagpeningaskipanini var ongin ivi um, at politiski viljin var at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum vóru knýtt at hesi skipan, sigur Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna, sum undrast yvir, at fólk, sum onga aðra trygging hava í sambandi við sjúkrafráveru eru koyrd úr skipanini**

DAGPENGAR
*Turið Kjølbro*



*- Tað er sera óheppið at sjálvstøðug vinnurekandi verða koyrd úr tí skipan, sum tey sjálvi annars hava rindað til, og sum virkar sum ein trygd fyri arbeiðsplássið, sigur Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna*

Týsdagin setti Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna, skrivligan fyrispurning til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum viðvíkjandi dagpeningarskipanini, sum varð broytt seinasta summar. Tingkvinnan vil hava at vita, hvussu nógv fólk hava fingið boð um, at tey eru koyrd úr dagpeningaskipanini síðani løgtingslógin nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m. kom í gildi. Eisini vil hon hava at vita, hvør orsøkin er til, at tey eru koyrd úr skipanini, hvussu hesi fólk, sum eru koyrd úr skipanini, eru tryggjað inntøku, um tey gerast sjúk. Hon vil eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin hevur orðað tær reglur og tær kunngerðir, sum í lógini standa at skula koma í gildi, og um ikki, nær hetta verður gjørt.

Í viðmerkingum til fyrispurningin sigur tingkvinnan, at hon hevur fingið upplýst, at talan er serliga um fólk, sum eru sjálvstøðugt vinnurekandi og sum hava lítið virki, ið seinastu átta mánaðirnar eru koyrd úr dagpeningaskipanini

- At vera knýtt at dagpeningaskipanini hevur stóran týdning fyri hesi fólk, tí tey standa á berum, um tey av eini ella aðrari orsøk gerast sjúk og ikki kunnu forvinna til lívsins uppihald hetta tíðarskeið. Tey eru so fá — og tosa vit um sjálvstøðugt vinnurekandi, er oftast talan um einstaklingar. Tí er tørvurin so mikið størri hjá hesum arbeiðsplássi at vera knýtt at eini skipan, sum kann tryggja arbeiðsfólkið løn vegna sjúku, um tað skuldi gjørt neyðug. Tað var ein tryggleiki hjá hesum at vera limir í skipanini, sum tey goldu til mánaðarliga, verður sagt í viðmerkingunum.

## Klípini í samfelagnum

Annita á Fríðriksmørk heldur, at samgongan eigur at gera alt fyri at birta upp undir møguleikan hjá smáum virkjum og sjálvstøðugum vinnurekandi at verða verandi virkin í sínum arbeiði.

- Hetta eru tey klípini í samfelagnum, sum hvør í sínum lagi eru við til at menna og uppbyggja okkara vinnuførleika og samleika, og sum við tógvið stríð hava fingið tað virksemi at koyra, sum tey brenna fyri og sum tey vanliga leggja nógv størri orku í enn, hvat hetta kastar av sær av fíggjarliga. Oftast er tað áhugin, sum drívur verkið hjá hesum smáu fyritakandi runt um í landinum, og tí er tað stórt spell, um hesi ikki hava møguleika fyri at tryggja sítt lítla virksemi fyri sjúkradagar, sum kunnu stinga seg upp inn í millum.

- Hesi hava sum er ongan annan møguleika at tryggja seg fyri sjúkrafráveru, og tí er tað sera óheppið um hesi verða koyrd úr tí skipan, sum tey sjálvi annars hava rindað til, og sum virkar sum ein trygd fyri arbeiðsplássið.

- Tá viðgerðin var í tinginum um broytingarnar í dagpeningaskipanini var ongin ivi um, at politiski viljin var at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum vóru knýtt at hesi skipan. Men síðani er so tað hent, at fleiri fólk, sum vóru limir í skipanini, eru koyrd út. Og tað er at undrast yvir, tá hugsað verður um, at hesi onga aðra skipan hava at tryggja sítt virksemi fyri sjúkrafráveru.

Í lógini er í sjey greinum orðað, at landsstýrismaðurin skal gera reglur og kunngerðir. Og hesar eru eisini avgerandi fyri, hvussu lógin sum heild kann umsitast. Annita á Fríðriksmørk vil tí fegin vita, hvat røkist fyri hesum reglum og kunngerðum.

# Forsorgarhjálp er mannminkandi

**- Tá ið man roynir at klára seg sjálva og hevur bygt eitt arbeiðspláss upp, átti onkur annar útvegur verið enn forsorgarhjálp. Tí má eg bara skúgva tankan um at eg kann gerast sjúk, til viks, sigur Unnur Jensen, sum rekur tannlæknastovu í Havn**

DAGPENGAR
*Turið Kjølbro*

- Tíbetur havi eg bert havt brúk fyri dagpengum eina ferð øll hesi ár, og hóast tað eg fekk haðani var ógvuliga lítið, var tað kortini betri enn einki, sigur Unnur Jensen, tannlækni í Havn.

Hon hevur havt einstaklingavirki í eini tíggju ár, men stovnaði fyri tveimum árum síðani smápartafelag og fór tískil uppí Sjálvbodnu Dagpeningaskipanina. Men seinasta summar, eftir, at nýggja dagpeningalógin kom í gildi, fekk hon at vita frá Dagpeningadeildini á Almannastovuni, at hon ikki longur hevur rætt til útgjald, verður hon sjúk.

- Tá ið tú einsamøll rekur eitt privat virki, sum eg eina tannlæknastovu, ert tú sjálv inntøkukeldan. Eg kann ikki biðja klinikkgenturnar arbeiða fyri meg. Verði eg sjúk, steðgar inntøkan til alt virkið, men lønir til arbeiðsfólkið og fastar útreiðslur annars skulu gjaldast kortini. Dagpengar til mín sjálvs í sjúkrafráveru kunnu kortini ikki vigast upp ímóti øllum teimum útreiðslunum, men í besta føri partvíst mín egna tørv. Tískil ber tað rætt og slætt als ikki til hjá mær at vera heima vegna sjúku. Verði eg sjúk, má eg sum skjótast til arbeiðis aftur og eisini royna at heinta tað inn aftur, sum er mist, sigur Unnur Jensen.

## Tung ábyrgd

Tað er ein ógvuliga stór ábyrgd at vera einasta inntøkukeldan á einum arbeiðsplássi. Unnur Jensen sigur, at tað als ikki ber til at leggja upp fyri løn undir sjúku á útreiðslusíðuni á einum lítlum virki, tá ið útreiðslurnar eru so nógvar.

- Eg royni at skúgva tankan, at eg kann gerast sjúk, til viks. Tað er ógvuliga tungt. So leingi tað gongur væl, hugsar tú kanska ikki so nógv yvir tað. Eg kann aldri verða heima sjúk við góðari samvitsku, tá ið tað gongur út yvir alt arbeiðsplássið.

Hon hevur kortini einki boð uppá, hvussu ein tryggjar seg á bestan hátt. Enn er í Føroyum ikki møguleiki at tekna trygging fyri alt virkið, har allar útreiðslurnar eru innroknaðar einum útgjaldi, verður inntøkukeldan sjúk.

- Ein slík trygging hevði gjørt allan munin, men at arbeiða fram ímóti eini betri trygging, hevur víst seg at verða ógvuliga tungt og krevjandi. Øll, sum hava privat virki við bert einari inntøkukeldu, hava somu kor. Tað ber ikki til í mínum føri at fáa nakran annan at gera arbeiðið fyri teg. Virki, har onnur kunnu átaka sær arbeiðið hjá tí, sum verður sjúkur, eru øðrvísi fyri, sigur Unnur Jensen.

At forsorgarhjálp er einasta hjálpin, hon kann fáa, verður hon sjúk, heldur Unnur Jensen, vera heilt burturvið.

- Tá ið man roynir at klára seg sjálva og hevur bygt eitt arbeiðspláss upp, átti onkur annar útvegur verið enn forsorgarhjálp. Tað er rættiliga mannminkandi. Tá er virkið longu farið fyri bakka. Í veruleikanum eru smá privat arbeiðspláss verri fyri, enn onnur, tá ið tað ræður um løn undir sjúku.